Íslendska Fiskiveiðieftirlitið:

# Sancy liggur neyvan leingi á Eskifjørðinum

**– Sancy er í løtuni í hondunum á sýslumanninum og løgregluni í Eskifjørðinum, har viðurskiftini verða kannað, sigur Dagmar Sigurðardóttir hjá íslendska fiskiveiðieftirlitinum**

SANCY-MÁLIÐ
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*Neyðugt var hjá íslendsku sjóverjuni at seta menn umborð á Sancy við tyrlu, tí føroyski trolarin aktaði ikki boðini um at steðga*

Dagmar Sigurðardóttir, ið er kunningarfólk hjá íslendska fiskiveiðieftirlitinum, segði í morgun við Sosialin, at sýslumaðurin og løgreglan á Eskifirði í løtuni eru í holt við at kanna, hvør sannleikin er í málinum um føroyska djúpvatnstrolaran, Sancy, sum íslendska sjóverjan tók í íslendskum sjógvi næst síðstu nátt.

Hon sigur, at lastin verður kannað, eins og skipsdagbók og onnur viðurskifti, sum íslendsku myndugleikarnir hava áhuga fyri.

– Men eg vænti ikki, at Sancy verður liggjandi leingi á Eskifirði. Helst gongur dagurin í dag og kanska morgindagurin, áðrenn skipið sleppur avstað aftur.

Hon vísir á, at reiðaríið helst fær møguleikan at veita eina trygd í peningi, so skipið ikki verður liggjandi longri enn neyðugt.

– Reiðaríið hjá Sancy hevur fingið sær ein íslendskan sakførara, sum tekur sær av málinum vegna trolaran.

Dagmar Sigurðardóttir sigur, at tá ið kanningarnar eru lidnar, og málið er búgvið til støðutakan í íslendsku skipanini, verður tað helst avgjørt í Eskifirði ella á Egilstøðum.

Tað var 46 ára gamla íslendska sjóverjuskipið, Óðin, sum tók Sancy á veg úr Íslandi til Bretlands.

Tá ið Sancy sigldi til Eskifjarðar eftir boðum frá íslendsku sjóverjuni, vóru tveir menn, sum komnir vóru úr Reykjavík, umborð á skipinum á ferðini.

UPP & AFTUR-LATINGARTÍÐIR

**Svimjihøllin verður opin allan dagin í summarfrítíðini,** undantikið mikudag og sunnudag, frá mánad. 19/6-2006 til leygard. 11/8-2006



*Tíðirnar eru hesar:*

| | |
|---|---|
| Mánadag | kl. 06:45 - 20:00 |
| Týsdag | kl. 06:45 - 20:00 |
| Mikudag | kl. 06:45 - 09:00 |
| Hósdag | kl. 06:45 - 20:00 |
| Fríggjadag | kl. 06:45 - 20:00 |
| Leygardag | kl. 09:00 - 17:00 |
| Sunnudag | kl. 08:00 - 10:00 |
| & | kl. 14:00 - 17:00 |

SVIMJIHØLLIN Í GUNDADALI
Hoydalsvegur 21 · Tel 302070
www.svimjihollin.fo




**Skjótt og bíligt av landinum - tá tað passar tær**

| | | Prísir úr: |
|---|---|---|
| Keypmannahavn | Upp í 27 ferðir um vikuna | 2020 |
| Billund | Upp í 7 ferðir um vikuna | 2046 |
| Aalborg | Upp í 2 ferðir um vikuna | 2068 |
| Rekjavík | Upp í 5 ferðir um vikuna | 1747 |
| London | 2 ferðir um vikuna | 2072 |
| Aberdeen | 2 ferðir um vikuna | 1938 |
| Hetland | 2 ferðir um vikuna | 2037 |
| Oslo | 2 ferðir um vikuna | 2033 |
| Stavanger | Upp í 2 ferðir um vikuna | 1832 |
| Stord | 1 ferð um vikuna | 1832 |
| Narsarsuaq | 2 ferðir um vikuna | 5874 |

... og tá eru skatturin og onnur avgjøld íroknað.

Prísirnir eru við keypi á atlantic.fo
Les meira á heimasíðuni.

Bílegg feðaseðilin á tíni ferðaskrivstovu ella á www.atlantic.fo
ALPHA Tel 352 900 · Faroe Travel Tel 312 600 · FLOGFELAG FØROYA Tel 340 000 · FONN FLOG Tel 456 363

ATLANTIC AIRWAYS
Atlantic Airways ger tað stuttligari at liva í Føroyum · www.atlantic.fo